# Kjak

**Regin Berg**
*Vegna MFS*

## Aftursvar til HUXA

*Eftir at HUXA skírir MFS at vera burturvið, oyðslutt og merkt av óvitsku, føla vit okkum noydd at vísa ákærunum aftur*

### Burturvið?

Sambært HUXA er tað burturvið at finnast at lækkandi ferðastuðli, dýrari lánum og veitingum, sum ikki taka hædd fyri inflatión. Hetta tí at Føroyar eru mest framkomna landið í heiminum innan stuðul til lesandi. Hetta passar heilt einfalt ikki. Tað eru ikki Føroyar, sum veita teimum allarflestu føroysku lesandi stuðul, tað er Danmark.

Vit finnast somuleiðis ikki at tí, at ferðastuðulin verður lækkaður. Vit finnast at, at ferðastuðulin lækkar eins nógv hjá øllum, tí at "tað ber til" hjá lesandi í Danmark at fáa bíligar túrar heim. Hví skal stuðulin t.d. lækka hjá fólki uttanfyri Danmark, tá tað í teimum allar flestu førunum kostar meira at koma heim, enn stuðulin tey lesandi, sambært uppskotinum, fáa?

Seinastu kanningarnar siga okkum, at bara ein fjórðingur av teimum lesandi siga seg ætla at koma aftur til Føroyar. Tí eiga vit at gera alt vit kunnu, fyri at tryggja okkum at tey varðveita sambandið við Føroyar. At gera minni, tað eigur ikki at vera ein møguleiki. Tað Føroyar í løtuni gjalda fyri tey allarflestu, sum eru farin undir hægri lesna, er 5.000 krónur um árið. 25.000 krónur fyri ein føroying, sum kemur aftur við eini master, er einki afturímóti tí, sum onnur lond vit vanliga samanbera okkum við gjalda.

### Oyðsl?

Tá tað snýr seg um nullvøksturin í almennu fyrisitingini, hevur HUXA heilt einfalt misskilt tað vit siga. Vit hava einki ímóti, at embætisverkið skal spara, eins og vit einki høvdu havt ímóti, at embætisverkið bleiv størri. Hetta hevur MFS sum felagsskapur fyri so vítt onga meining um. Tað vit finnast at er, at politiska skipanin bara sigur: "Nullvøkstur! Antin siga vit fólki upp, ella eisini sleppur lønin ikki at vaksa", heldur enn at hyggja eftir, hvat í almennu fyrisitingini vit kunnu spara burtur, hvørjum vit ið hvussu so er hava brúk fyri, hvørjar minni neyðugar skipanir vit hava, ella hvar bygnaðurin er óneyðuga dýrur.

Bara at spara fyri at minka tølini – uttan raðfesting – hevur bara við sær, at antin verður arbeiðsbyrðan tyngri hjá teimum sum eru eftir, ella verður lønin minni í mun til onnur lond, sum kann hava við sær at uppaftur færri at flyta heimaftur.

### Óvitska?

MFS hevði ikki kent seg noytt at tala at, um vit vóru sannførd um, at minni stuðul til lesandi er føroyska samfelagnum at gagni. Trupulleikin har er bara, at Føroyar spara serstakliga lítið við hesum tiltaki, um ein samanber við aðrar alternativar møguleikar. Beinleiðis og óbeinleiðis studningurin til fiskivinnuna, veruligar reformar innan embætisverkið, hægri skatt/gjøld, stigvíst at lækka almennu pensjónina, rationellari skúlabygnað ella eldraverk... Har er ein hópur av møguleikum, sum øll vita eru har. Trupulleikin er bara, at avgerðirnar antin verða skotnar út í framtíðina ella goymdar burtur.

Tað sum MFS eftirlýsir, er at tað ber til at siga, hvør politikkurin er í Føroyum, hvar lesandi og hægri útbúgving sum heild passa inn og hvør ætlanin við politikkinum er.

## Platini í Føroyum



**Jógvan Arge**

Tað var ein stórhending leygardagin, tá UEFA-forsetin Michel Platini kom til Føroya at hitta FSF og føroyskar myndugleikar. Ikki minni stórt var tað, at hesin fyrrverandi stórspælarin og núverandi oddamaðurin í altjóða fótbólti handaði føroyameistarunum 2010 ferðasteypið.

Tað hevur týdning, at oddamenn í altjóða fótbólti vísa Føroyum ans. Umráðandi er eisini, at teir við egnum eygum síggja tær umstøður, sum fótbólturin verður íðkaður undir heima hjá okkum og hvønn áhuga, hann hevur millum ítróttafólk og áskoðarar.

Má siga, at teir nýggju vindarnir í FSF tykjast flógvir. Christian Andreasen, forseti, hevur saman við sínum monnum dugað at fáa oddamenn í bæði UEFA og FIFA upp í vindin. Tað elvir til vónir um, at vit í Føroyum sum frálíður fara at fáa breiðari ágóða av altjóða limaskapunum.

Eitt er tann margfalda luttøkan í allahanda fótbóltskappingum, sum vit eftirhondini eru komin væl við í. Vit mugu rokna við at leggja rygg til eina fleingju av og á, men heldur enn at gevast á hendur eiga vit at seta miðini fremri.

Til tess krevjast møguleikarnir at íðka fótbóltin undir góðum og tryggum umstøðum. Pengamaskinurnar UEFA og FIFA eru vanliga ikki smátøknar, tá tað snýr seg um útvegan av slíkum kørmum. Teirra endamál er jú at breiða íðkanina av fótbólti so víða, sum til ber.

Í fleiri førum eru vit eftirbátur í so máta. Tað stendst ikki minst av, at landsins myndugleikar hava tikið av ta almennu skipan, sum var um stuðul til ítróttabyggingarnar og tílíkt. Nú kemur bara onkur hissini játtan av og á, oftast ript úr øllum samanhangi, og stórur vandi er fyri stagnasjón yvir alla linjuna.

Tí er tað sera áhugavert, at ein maður sum Michel Platini saman við næstu embætisfólkum sínum í evropeiska fótbóltssambandinum UEFA tekur sær stundir at koma til Føroya at kunna seg við umstøðurnar, sum hann nokk hevur hoyrt um, men ikki upplivað sjálvur.

Tað kann bara vera okkum til fyrimunar, og skilti eg hann rætt hendan dagin, so fór hann at gera sítt til, at smátjóðir sum Føroyar ikki verða settar á síðulinjuna í altjóða kappingum. Og hann legði aftrat, at mál av slíkum slag hevur ikki verið fyri á nevndarfundum hjá teimum.

Á hin bógvin var hann fyri at spjaða til karmarnar fyri fótbóltinum í Føroyum. Vit síggja tað allastaðni, har okkara lið kappast í Evropa, at meginstadion og stadion yvirhøvur verða endurnýggjað ella nýbygd, so umstøðurnar at spæla, hyggja og bera víðari eru í toppi.

Hendan dagin kom Platini úr Íslandi, har umstøðurnar kring tjóðarvøllin í Laugardali júst eru dagførdar, og hann rósti íslendingum fyri, at teir hava útvegað sær hallir til fótbólt.

Hann helt, at hetta er ein leið, sum føroyingar eisini eiga at ganga, og vísti á, at skalt tú standa teg nóg væl í altjóða fótbólti, so mást hava umstøður at spæla alt árið.

Platini tók til, at hallirnar og betri vøllir hava havt við sær, at Ísland hevur spælt seg til endaspælið fyri U21-landslið m.a. við at sláa út Týskland, sum hevur verið mett sum fyrimyndin fyri ungdómsfótbólti. Tað er óhoyrt.

Hvat kemur so burtur úr hesi stuttu, men forkunnugu vitjanini hjá Platini, sum eisini hevði nevndarlimin í UEFA, danska Allan Hansen við í ferðalagnum?

Tað veldst um okkara hegni at leggja ætlanirnar og bera málini fram.